## AFTUR TIL VERKA

Tú kanst fara aftur til verka, tá ið tú kennir teg nóg birga/n. Týdningarmikið er, at tú rørir teg. Um læknin heldur, at tú skalt binda frið orsakað av skurðviðgerðini, skrivar hann eina sjúkramelding.

Tú ert sjúkrameldaður til tann:

Vinaliga
starvsfólkini á KS3

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS
TLF. 45 45 45

# BEST ER AT BINDA UM HEILAN FINGUR

**AFTAN Á**
SKURÐVIÐGERÐ

## PÍNA
Í sambandi við at doyvingin fer úr kroppinum, kanst tú fáa pínu í ella um skurðstaðið. Pínan linkar eftir nakrar dagar, men kann gera, at tú ikki fært rørt teg sum vant. Tú kanst røra teg til pínumarkið, um annað ikki er tilskilað.

Fyri pínu kanst tú taka heilivág, sum fæst í handkeypi, um læknin ikki hevur givið tær onnur boð.

Mælt verður til:

## BLØÐING
Í einstøkum føri kann bløðing koma fyri aftan á skurðviðgerðina. Sjúkrarøktarfrøðingurin kannar umbindingina, áðrenn tú fert heim. Um tað skuldi hent, at tú fert at bløða meira enn tað, tú hevur fingið at vita frá sjúkrarøktarfrøðinginum, skalt tú ringja á seingjardeildina á tlf. 45 45 45 og spyrja teg fyri.

## UMBINDING
Umbinding og vatnskíggjandi plástur kunnu takast av aftaná:

dagar

## PENTUR
Um tú hevur fingið pentur í sárið, gevur læknin tær boð, áðrenn tú fert heim, um hvussu leingi penturnar skulu sita. Summar pentur hvørva av sær sjálvum, og aðrar kunnu takast hjá kommunulækna. Um læknin sjálvur vil taka penturnar, fært tú eina tíð í skurðambulatoriinum.

Pentur takast tann:

## PERSÓNLIGT REINFØRI
Tú kanst fara undir brúsu aftaná:

dagar

Ansa eftir ikki at gera sárið vátt. Klistra fyri sárið, um tú vaskar tær. Tað verður ikki viðmælt at fara í bað, í svimjihøllina ella at baða á sjónum, áðrenn sárið er heilt frískt. Tað tekur umleið 14 dagar.

## BRUNI
Bruni kann koma í sárið aftan á eina skurðviðgerð. Ver ansin, um sárið nakrar dagar aftaná hovnar, og tú fært ilt. Húðin rundan um kann rodna og hitna, og møguliga kann væta renna úr sjálvum sárinum. Um so er, skalt tú seta teg í samband við skurðambulatoriið á tlf. 45 45 45.

## ROYKING
Viðmælt verður, at tú ikki roykir aftan á eina skurðviðgerð. Royking ger, at sárið ikki lekir eins væl, og royking kann eisini gera ljótt arr.